# TILTØK

**Fríkirkjan Oasan**
*Uppi á Brekku 3, Hoyvík*
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Rúna Rasmussen.
Fríggjakvøldið kl. 20 After Eight.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti v/ sørvingum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli,kl. 18 Møti v/ klaksvíkingum.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.

**Hebron, Argir**
Mikudagin kl. 20.00 Bíbliutími og bønarløta. Páll Poulsen talar um Opinberingina kap. 5.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin Familjumøti kl. 10.30 har tala Símin Ósá og Óli Steinberg um »Trúboðaravirki í Grønlandi«. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar m.a. Jógvan Zachariassen um »Týdningurin av einum – partur 1«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Sunnudagsskúli er kl. 12.
Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 Bøn- og bíbliutími. Øll eru vælkomin.
www.livdin.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Hósdagin kl. 20 Bíbliutími v/ Jóannis Fonsdal, evnið: Op. 19.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Finn Arvé prestur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli. »Hann fer undan tykkum til Galileu, har skulu tit síggja hann, soleiðis sum hann hevur sagt tykkum«. Mk. 16.7.
Mikukvøldið tann 17. nov. kl. 19.30 fyrireika vit okkum til Adventina, saman við Finn Arvé presti. Aftaná verður ein kaffimuður í Meinigheitshølinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið hittist. Ung frá 13 ár og uppeftir eru vælkomin við.
Mikudagin kl. 18 í KFUK: Vit gera klárt til basarin.
Hósdagin kl. 19 í KFUK: Basarur, sí aðra lýsing í blaðnum.

**Meinigheitshúsið**
Mikukvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hósdagin kl. 16-17 venur Gentukórið, 8 ár og eldri.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 19.30-21.30 Juniorhugni, frá 5. flokki.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti – eyka meinigheitsfundur. Manskórið syngur.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Týsdag kl. 17.30 og 20 Hornvenjing.
Mikudag kl. 15 Bønarfundur.
Barnarøddir venja kl. 17.30.
F. H.-ungdómur skipar fyri fundi kl. 19.30 har tema er Rús og Rúsevni. M. Garalíð tosar um »Lív mítt við og uttan rúsevnir«. P. H. Midjord »Ungur í dag og rúsevnir« N. E. Olsen »Hví eri eg avhaldsmaður«. N. Djurhuus tekur samanum og endar.
Drekkamuður. Øll eru vælkomin.
Hósdag kl. 20 Heimaforbundið – fyri allar kvinnur.

**Frá Ebenezer**
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði fyri børn 9 ár og eldri, kl. 20 Evangel. møti. Talarar: Poul Johan DJurhuus og aðrir.
Mikudag kl. 16.45 Sang-venjing – yngra barnakórið, kl. 17.30 Awana fyri børn í 1.-4. flokk, kl. 20 Evangel. møti. Talarar: Óli Wolles og aðrir.
Hósdag kl. 10 Fyrrapartsløta fyri eldri menn í Sloans húsi, kl. 17 Sangvenjing – eldra barnakórið, kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
www.ebenezer.fo

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 Bøn fyri býnum og Ísrael, kl. 19 Delli.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti v/ Vagn í Geil. Evnið er: »Andi, sál og likam«.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC v/ Malenu Meitilberg, evnið er: Gestablídni 1. partur, kl. 16 Samkomufundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Sandavágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman í Meinigheitshúsinum hóskvøldið 18. nov. kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið Libanon**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið 18. nov. kl. 20. Mint verður á jólapakkarnar. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Saron, Haldórsvík**
Í kvøld verður bíbliuundirvísing og bønarmøti kl. 20 hjá Elianu og Magnus Olsen. Verið hjartaliga vælkomin á møti.

**Haldórsvík**
Missiónsvikan byrjar í Avhaldshúsinum hóskvøldið kl. 20. Olaf Magnussen talar, Petur Hans og Thomas Dam syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 21 skipar Sangbólkurin Salt fyri konsert.
Leygarkvøldið kl. 21: Awake við Alice Frederiksberg.
Sunnudagin kl. 9.30-13 Temamorgun fyri hjún, øll áhugað vælkomin, kl. 17 Møti við Jastrid og Paula Høj, evnið: Familjan. Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Samkoman Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 19.30 Missiónsmøti v/ Jens og Malenu Meitelberg.
Hósdagin møta Tim5 og Liljur kl. 18.30.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

**Eiði**
Týskvøldið kl. 20 Katekismusgudstænasta í kirkjuni.
Evnið: Rong og røtt læra um grøðing og salving.
Mikukvøldið kl. 20 Katkismusgudstænasta í kirkjuni.
Evnið: Niður farin til heljar.
Hóskvøldið Karmel kl. 19.30 Bíbliutími: Efesusbrævið, kl. 20 Møti við Ámundi Berthelsen, Strondum. Menn av Strondum syngja.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa í kvøld kl. 19.30, Sigurð Vang talar.
Evnið: Rutt 1. kap. – Týdningarmiklar avgerðir.
Á møtinum sunnudagin kl. 11 talar Jústnes Eliasen um Rutt 2. kap. – Signingar á akrinum, og á møtinum kl. 18 talar Klæmint Eliasen um Rutt 3. kap. – Náttarfundurin.
Mikukvøldið 24. nov. kl. 19.30 talar Karl Jóhan Nielsen um Rutt 4. kap. – Loysarin. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Missiónsvikan er hesa vikuna.
Mikukvøldið kl. 19.30 Øssur Kjølbro, Askham syngja.
Hóskvøldið kl. 19.30 Alfred Olsen, Streingjakórið syngur.
Fríggjakvøldið kl. 19.30 Niels Jacob Nielsen, Gratia syngur.

**Betesda, Norðoyggjar**
**Mikukvøldið kl. 20** talar Bárður Ljósheim, trúboðari í Grønlandi.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.30 Sunnudagsskúli,
kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadag kl. 20 Bønarfundur.
Mikudag kl. 20 Uppbyggingarfundur.
Hósdag kl. 21 Ungdómsfundur.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøldið kl. 19 Barnamøti »Jesus vinir«.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Missiónsvikan byrjar hóskvøldið kl. 20 við Absalon Matras, sum eisini greiðir frá ferð til Rumenia.
Fríggjakvøldið kl. 20 talar Andras Miðskarð o.a. úr Klaksvík.
Leygarkvøldið kl. 20 talar Regin høgnesen o.a. úr Leirvík.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Regin Høgnesen o.ø. úr Leirvík. Bæði kvøldini innsavning til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20 Bíbliutími. Áps. kap. 16.
Hóskvøldið kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman.
Minnist til jólapakkarnar.
Hjartaliga vælkomin.

**Evangel. møtirøð í Vági**
Í døgunum 19.-21. nov. verða evangel. møtir í Framtíðini. Fríggja- og leygarkvøldið byrja møtini kl. 20. Sunnukvøldið byrjar møti kl. 21.
Møguleiki fyri forbøn verður á øllum møtunum. Eftir øll møtini er eisini møguleiki fyri at fáa eitt andaligt prát við tey, sum standa fyri. Tað eru suðringar úr ymsum samkomum, ið standa fyri. Øll eru hjartaliga vælkomin at hoyra Guds orð.

**Frelsunarherurin í Vági**
Hósdagin kl. 20 Streingjakórið venur jólasangir.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Eingrím Holm talar.
Mánadagin Bíbiltími v/ Eingrím Holm, 1. Jóhs. Br.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi.


## Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum

**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
**Form: Leila Solmunde**
**Tlf: 317373, Fax 310813 til 16.00**

**Heimasíðan: www.mbf.fo**
**T-postur: mbf@mbf.fo**
**Skrivstovan er opin:**
**Mánadag til fríggjadag frá kl. 09.00**

*MBF umfatar 23 limafeløg:*

**Alzheimerfelagið**
**Tórsbyrgi 16**
**100 Tórshavn**
Form: Sigrun Mohr
Tlf: 315298
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur:
sigmo@post.olivant.fo
Samband fæst við felagið á tlf: 313102
Demenslinjan. tlf 313102 svarar týsdag kl: 18-20

**Føroya Astma- og Allergifelag.**
**Íslandsvegur 10 c,**
100 Tórshavn
Form: Evy Danelsen
Tlf: 311419 / 265321
t-postur:
astma@post.olivant.fo

**LFA-Landsfelagið fyri fólk við autismu**
**Niðari vegur 34**
660 Søldarfjørður
Form: Lea Wolles
Tlf: 442031 / 509031
T-postur: leawo@kallnet.fo

**Føroya Blindafelag**
**Íslandsvegur 10 a,**
**Box 2074**
**165 Argir**
Fartlf: 219908

**Cøliakifelag Føroya**
**Postadressa: MBF-húsið**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Form: Anne Gretha Hansen
tlf: 448664

**Deyvafelag Føroya**
**Íslandsvegur 10b**
**100 Tórshavn**
Form: Hermund Zachariassen
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag kl: 10-15
Tlf: 317597, fartlf: 222381, skrivtlf: 316929, fax 313609,
T-postur: deaf_fo@post.olivant.fo
Heimasíða: www.deaf.fo

**Diabetesfelag Føroya**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Form: Kristiana Rein
Tlf: 319508 / 225012
T-postur: diabetes@diabetes.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Form: Randfríð Sørensen
Tlf: 313978
T-postur:
randfrid@post.olivant.fo

**Felagið fyri hoyribrekað í Føroyum**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Form: Solveig Isfeldt
Tlf: 313484 / 219584
T-postur: hoyr@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Form: Anna Petersen
Tlf: 310237
Heimasíða: www.gikt.fo
T-postur: gikt@gikt.fo
Opið er týs og hósdag frá 13:00 til 16:00

**Heilafelagið**
**Felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
**Íslandsvegur 10c**
Form: Hanna á Reynatúgvu
Telefon 361933
T-postur:
heilaf@post.olivant.fo

**Høgættarfelagið**
**Heiðavegur 4**
**100 Tórshavn**
Form: Johan Jacobsen
Tlf: 313379 / 213379
T-postur: jojac@post.olivant.fo

**Javni**
**Hoyvíksvegur 40**
**110 Tóshavn**
Form: Malena Arnholdsdóttir
Tlf: 314827 / fax 310557
T-postur: javni@javni.fo
Heimasíða: www javni.fo
Opið: týsdag til fríggjadag kl: 10-14

**Lymfødemfelagið**
**187 Hvítanes**
Form: Harriet Nybo
Tlf: 317617

**Felagið MBD/DAMP-børn**
**Smærugøta 5**
**100 Tórshavn**
Form: Bára Johannesen
Tlf./fax 317912

**Morbus Bechtrew**
**Niðaragøta 54**
**188 Hoyvík**
Form: Tróndur Ennistíg
Tlf: 319995

**Nýrafelagið**
**Postsmoga 1063**
**110 Tórshavn**
Form: Tummas Pauli Thomsen
tlf: 315928
thomsen1@post.olivant.fo

**Parkinsonfelagið**
**MBF-húsið**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Form: Kristina Vesturklett
tlf: 317317
T-postur: fhkv@post.olivant.fo
Hildubjørg Weihe tlf: 313897
T-postur:
jwimport@post.olivant.fo

**Føroya Psoriasisfelag**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Form: Majgunn Poulsen
Tlf: 424179
T-postur: jsemma@kallnet.fo

**Sclerosefelagið**
**Á Byrgisheygg 1**
**627 Lambi**
Formaður: Hendrik Jacobsen
Tlf: 449325
T-postur:
hendrik.jacobsen@skulin.fo
Heimasíða:
sclerosufelag@sclerosufelag.fo
Heimasíða:
www.sclerosufelag.fo

**Sinnisbati**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Tlf: 322544, Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá 16:00 -18:00
Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19:30.

**ÍSB**
**Ítróttarsamband fyri brekað**
**ÍSF-húsið**
**Gundadalur**
**100 Tórshavn**
Form: Jógvan Jensen
Tlf: 317579/216760, Fax 312421
T-postur: isb@post.olivant.fo
Heimasíða: isb.fo

**Spastikarafelagið**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Formaður: Sólrun Mortensen
Tlf: 319027 / 229101
T-postur:
s-felagid@post.olivant.fo

*Fleiri upplýsingar um feløgini fáast á heimasíðu www.mbf.fo hjá MBF*




# Mangt er frætt sum ei er satt

**Nevndarformaðurin í Smyril Line vísir staðiliga aftur øllum tosi um samanlegging millum Smyril Line og norska felagið Fjord Line. Norröna fer eisini næsta summar at sigla til Føroya, hóast onkur hevur róð fram undir, at hon kanska fer at verða skift um við annað skip, sigur hann**


*Klæmint Weihe, nevndarformaður í Smyril Line, vísir staðiliga aftur øllum tosi um samanlegging av Smyril Line og norska felagnum Fjord Line. Heldur ikki hava lánveitararnir lagt nakrar teytir á felagið í so máta, heldur hann uppá*

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Tosið um samanlegging við norska felagið Smyril Line hevur einki upp á seg. Og Norröna fer eisini komandi summar at sigla eftir vanligu summarferðaætlanini, sigur nevndarformaðurin i Smyril Line, Klæmint Weihe, sum vísir aftur øllum tosi um, at Fjord Line skal yvirtaka Smyril Line eftir trýsti frá fíggingarstovnunum hjá Smyril Line. Smyril Line hevur ongar ætlanir um at selja Norrönu, sigur hann.

Hann váttar, at samráðingar eru við fíggingarstovnarnar um støðuna hjá Smyril Line, ið sum øllum kunnugt er nakað strævin. Men hann væntar, at tað fer at liggja ein semja á borðinum nakað skjótt, og hon fer at vísa, at Smyril Line fer at halda fram sum sjálvstøðugt felag, metir hann.

Men hann váttar, at tað gongur ikki nóg væl á nýggju vetrarrutuni til Íslands, og har má finnast ein loysn. Inntøkurnar hava svikið, og so ber ikki til.

## Eingin samanlegging

Nógvar søgur ganga um lagnuna hjá Smyril Line, eftir at felagið saman við norska felagnum Fjord Line sendi út tíðindaskriv, har boðað varð frá, at arbeitt varð við eini samstarvsavtalu millum feløgini.

Frammi hevur verið, at fíggingarstovnarnir hjá báðum feløgunum skulu hava kravt, at feløgini leggja saman fyri at fáa betri rakstur.

Eisini hevur verið gitt, at norska felagið fór at svølgja Smyril Line og fara avstað við Norrönu fyri síðan at seta annað skip á summarrutuna hjá Norrönu.

Hesar søgurnar hava millum annað botn í, at hetlendski nevndarlimurin í Smyril Line, Morgan Goodlad, og kunningarstjórin í Fjord Line, Atle Kvamme, hava sagt við ávikavist hetlendskt blað og føroyskt útvarp, at talan kann gerast um samanlegging.

Men Klæmint Weihe vísir staðiliga aftur, at nakað er um hetta. Í hvussu er ikki, sum hann kennir støðuna í løtuni, sigur hann.

– Eg fekk eitt teldurbræv frá Morgan (Goodlad, blðm.) beint eftir, at hatta hevði staðið í hetlaendska blaðnum, har hann segði, at hann var ikki rætt endurgivin í blaðnum, greiðir Klæmint Weihe frá.

Sosialurin hevur roynt at fingið orð á Morgan Goodlad, men tað eydnaðist ikki. Av skrivstovu hansara varð sagt, at hann var í Keypmannahavn og hevði onga fartelefon.

Klæmint Weihe váttar, at øll leiðslan hjá Smyril Line er í Keypmannahavn, har tosað verður um innanhýsis viðurskiftini hjá felagnum. Ongar samráðingar eru við aðrar partar beint nú, sigur hann.

Um tað, sum kunningarleiðarin á Fjord Line hevur sagt við Útvarpið, sigur Klæmint Weihe, at tað kann hann ikki gera viðmerkingar til.

– Eg havi ikki hoyrt hatta. Eg kenni ikki mannin og veit ikki, hvat hann heldur kann fara at henda í framtíðini, sigur Klæmint Weihe.



## Gomul avgerð

Nevndarformaðurin í Smyril Line sigur, at tað, at Fjord Line flaggar síni skip út og skrásetir tey í føroysku altjóða skipaskrásetingini, einki hevur við komandi samstarvið við Smyril Line at gera, sum onkrar keldur vilja vera við.

– Her er talan um eina gamla avgerð hjá teimum, sum nú gerst møgulig, tí norsk lóg nú loyvir tí, sigur Klæmint Weihe.

Smyril Line og Fjord Line kennast soleiðis professionelt, sigur hann, og tað er tí, at tingast hevur verið um eina samstarvsavtalu. Einki við lánveitarar at gera, leggur hann dent á.

– Vit brúka somu havnir í Noreg og í Danmark, og tað var tí natúrligt at tosa saman um samstarv heldur enn bara kapping.

– Fjord Line hevur eisini trupulleikar at dragast við, eins og øll onnur reiðarí í hesari vinnuni, so tað er upplagt, at eisini teir royna at finna avtalur, sum kunnu minimera útreiðslurnar. Júst sum Smyril Line alla tíðina noyðist, sigur Klæmint Weihe, nevndarformaður í Smyril Line.

## Annað skip

Eina avleiðing av eini komandi samstarvsavtalu við Fjord Line metir Klæmint Weihe fara at gerast, at Norröna um veturin fer at sigla á eini av rutunum hjá Fjord Line. Til dømis millum Noreg og England.

Tað merkir so, at hon verður tikin úr aftur vetrarsiglingini her norðanfyri, og at Smyril Line so má fáa sær annað skip til ta siglingina.

Smyril Line fór í heyst undir at sigla til íslands við Norrönu, og var ætlanin, at hendan rutan skuldi vera allan veturin.

Men rutan hevur ikki gingið serliga væl, og lítið hevur higartil verið at flutt av farmi, ásannar Klæmint Weihe. Hann gevur lutvíst veðrinum skuldina, men sannar tó, at tað er ikki bara sum at siga tað at byggja nýggja rutu upp.

Tað er ikki heilt óvist, ásannar hann, at neyðugt verður at gevast at sigla við Norrönu til Íslands um veturin og heldur fáa annað skip at sigla. Verður so Norröna leigað út um veturin, verður tað kortini neyðugt.

Íslandsrutan hevur ikki fignið tann farm, sum neyðugur er, so tað kann kanska gerast neyðugt kortini at skifta skip har, hóast Norröna siglir í norðurhøvum um veturin, heldur nevndarfomaðurin í Smyril Line. Hann heldur ikki, at tað er rætt at sleppa rutuni beinanveg, hóast hon ikki ber seg enn, tí tað tekur tíð at byggja slíka upp, vísir hann á.

## Royna skáa

Tað er einki dulsmál, at Smyril Line flýtur tungt í løtuni, og arbeitt verður av allari makt við at fáa ein avdráttarskáa, sigur nevndarformaðurin. Hann vónar, at tað fer at bera til at fáa ein slíkan nøkur ár fram.

Smyril Line hevði vónað at fáa part í flutningi av alifiski, sum væntandi skuldi vera ein stórur partur av føroyska búskapinum.

Men hesar ætlanir felagsins fóru mestsum heilt fyri einki við fallinum í alivinnuni. Og tað sær einki út tey tvey komandi árini heldur, sigur Klæmint Weihe.

Men at Norröna verður at síggja aftur í Føroyum næsta summar, sum hon plagar at vera, er hann ivaleysur í.


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**



Mikudagin 17.11. kl. 16$^{00}$
Mikudagin 17.11. kl. 18$^{30}$
Hósdagin 18.11. kl. 16$^{00}$
Hósdagin 18.11. kl. 18$^{30}$



Mikudagin 17.11. kl. 21$^{00}$
Mikudagin 17.11. kl. 23$^{15}$
Hósdagin 18.11. kl. 21$^{00}$
Hósdagin 18.11. kl. 23$^{15}$



Mikudagin 17.11. kl. 22$^{15}$
Hósdagin 18.11. kl. 22$^{15}$
*– Seinasta sýning*



Mikudagin 17.11. kl. 19$^{30}$
Hósdagin 18.11. kl. 19$^{30}$
*– Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMAR**



**Frumsýning**
Fríggjadagin 19.11. kl. 19$^{00}$
Fríggjadagin 19.11. kl. 21$^{15}$
Fríggjadagin 19.11. kl. 23$^{00}$



**Frumsýning**
Fríggjadagin 19.11. kl. 20$^{30}$
Fríggjadagin 19.11. kl. 23$^{30}$